# Kjakmentan í kreppu?

SÍMUN ABSALONSEN



**Viðmerking til Hans Andrias Sølvará**

Grein mín "Ein kjakmentan í kreppu?", sum stóð í Sosialinum í páskavikuni, hevur fingið onkrar viðmerkingar. Eg veit ikki um tað er tilvitað at ikki verður nomið við orsøkina til, at eg skrivaði hesa grein. Men lat meg fyrst gera greitt hví greinin varð skrivað.

Fáar dagar fyri páskir varð Hans Andrias Sølvará heiðraður av Miðlahúsinum fyri sítt kjakíkast. Høvuðkjakíkast hansara er, eftir míni metan, ein uppgerð við trúarinnihaldið í kristindóminum. Slíkar uppgerðir eru ikki óvanligar í bókaheiminum.

Tað, sum hinvegin tykist løgið er, at Miðlahúsið fagnar hesum fáar dagar fyri páskir og at løgmaður, sum júst hevur staðið á odda fyri at yvirtaka fólkakirkjuna, er partur av hesum tiltaki, sum ger upp við trúarinnihald fólkakirkjunar. Hetta var ein løgin "páskainngangur" og lítið sømiligt mótvegis tí stóru fjøld av føroyingum, ið framvegis virða páskavónina, ið er hjartað í kristindóminum.

Til tess at vísa á, at mín uppfatan ikki er tikin úr leysum lofti, samanbar eg aldargomlu apostólsku trúarorðini, sum hava røtur í frumkirkjuni, við skrivingina hjá HAS.

Mín meining um "Páskainngangin í Vágsbotni" er ikki ein ábreiðsla til HAS. Og HAS tykist ikki at hava nakrar viðmerkingar til sína trúaruppgerð. Hinvegin vil hann hava meg at grundgeva fyri sannleiksvirðinum í t.d. trúarjáttanini.

At trúarorðini eru partur av katólskari og lutherskari kristnifatan er ein sannroynd. Sannleiksvirðið er ein annar spurningur og sjálvandi ikki óviðkomandi.

Tá høvuðskeldurnar til trúarorðini, herundir ápostlar og kirkjufedrar, valla verða góðkendir av HAS, tí hann nýtir sínar tulkingar, so er ikki trupult at ímynda sær eitt slíkt kjak. Hartil er at siga, at kjakast hevur verið um hetta í øldir, bæði søguliga og gudfrøðisliga. Nógv er skrivað um evnið og í hesi alnótstíð er tað eisini lætt atkomiligt.

Tað hevur mangan vakt undran, hvussu ósamd søgufólk eru um mangt, sum liggur tætt upp at nútíðini. Tað undrar tí ikki minni, tá søgufólk fara undir at "reinsa" 1900 ára gamlar keldur fyri mytologi, fyri síðani at koma við síni ivaleysu niðurstøðu um, hvat "veruliga fór fram".

HAS skrivar niðrandi um mína "uppgerð" við rationalismuna. Hann skemtar við at SA heldur kanska at ein støddfrøðingur er víðgongdur tá hann trýr at 2 og 2 eru 4. Nú haldi eg at onkur gloymdi bóltin og fór eftir manninum. Og HAS tykist ikki gera mun á rationalismu sum rák og rationellum tankum.

Sum frøðingur minnir HAS meg á at grundgeva tá eg skrivi. Tað er altíð ein meting nær vit grundgeva nóg væl. Men annars eri eg sjálvur frøðingur og ikki ókendur við akademiskt háttalag. Men eg havi ígjøgnum lívið lisið meira gudfrøði enn tað sum annars er mín akademiska grein. Og sum "gudfrøðingur" er tað mín fatan, at HAS ferðast ógvuliga frítt um fakmørk.

# Kalvakvotan undir Íslandi skerd við 44 prosentum

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



**Seinastu árini er fiskiveiðuavtalan við Ísland betra á hvørjum ári. Men í ár er kalvakvotan skerd munandi. Kortini letur landsstýrismaðurin væl at í tíðindaskrivi nú hann og íslendski starvsbróðir hansara, Einar K. Guðfinnsson, eru komnir ásamt um fiskiveiðuavtalu landanna millum fyri 2008. Einasta broytingin er nærum helvtarniðurskurður í føroysku kalvakvotuni. Sjálvt um talan ikki er um stórar nøgdir, er spurningurin sera prinsipiellur**

Seinastu trý árini er avtalan betrað á hvørjum ári

Seinastu trý árini er fiskiveiðuavtalan millum Ísland og Føroyar betra á hvørjum ári.

Fleiri føroysk línuskip kunnu royna undir Íslandi samstundis, færri íslendsk svartkjaftaskip kunnu royna í føroyskum sjógvi samstundis, íslendsk skip kunnu nú landa botnfisk í Føroyum uttan niðurskurð í kvotu, føroysku sildaskipini kunnu royna eftir norðhavssild har íslendsku skipini royna og partar av lodnukvotuni kunnu nú framleiðast til matna umborð og á føroyskum virkjum.

Hóast nevndu og aðrar batar í fiskiveiðuavtaluni, er tað neyvan at gera Torbirni órætt, tá sagt verður, at hann á hvørjum ári hevur verið atfinningarsamur avtaluni viðvíkjandi. Tíðir skifta má sigast! Í ár fegnast hann, sjálvt um einasta broytingin er ein ógvusligur niðurskurður í kalvakvotuni á 44 prosent.

**Kalvakvotan skerd við 44 prosentum**

Tað er undrunarvert, at landsstýrismaðurin nú frøist um avtalu, sum í virði, er munin verri enn árini frammanundan.

Kalvakvotan er lækkað við heili 44 prosentum, úr 80 tonsum niður í 45 tons.

Spurningurin er um tað fer at loysa seg hjá skipunum, sum fiska kalva við Ísland at fara til fiskiskap í ár. Nøgdirnar eru nú so smáar og reiðskapurin er kostnaðarmikil. Tað fer at merkjast í rakstrinum hjá skipunum, tí kalvatúrarnir undir Íslandi hava nógvu árini frammanundan verið sera gott íkast hjá skipunum.

Landsstýrismaðurin uggar í bløðunum við, at samlaða kvotan framvegis er 5.600 tons og at missurin í kalvakvotu harvið er kompenseraður við tilsvarandi øktari hýsu-, upsa- og brosmukvotu.

Hugsi tað mann vera vána handil at býta samsvarandi nøgd av kalva við hýsu, upsa og brosmu, sum øllum kunnugt eru nógv bíligari fiskasløg og als ikki geva skipunum sama fíggjarliga íkast við tilsvarandi nøgd. Spurningurin er prinsipiellur, sjálvt um talan ikki er um stórar nøgdir.

35 tons av kalva hava við dagsins prísum eitt søluvirði, sum er omanfyri 2 mió. kr. Fyri tilsvandi nøgd av hýsu, brosmu og upsa fáast neyvan 300.000 kr.

Tað er undarligt at orka verður nýtt til at fegnast um eitt slíkt úrslit. Eisini hesaferð átti landsstýrismaðurin í minsta lagi at hildið fast.

# Ósannindi um uttanlandslánini

HELGI ABRAHAMSEN



**Tað er ótrúligt, at Høgni Hoydal skal fáa seg til at endurtaka somu ósannindi, sum hann annars roýndi at snúgva sær undan fyri nøkrum árum síðani**

Tann 1. apríl vóru 60 ár liðin, síðani Heimastýrislógin varð sett í gildi. Í tí sambandi hevði Útvarpið nógvar sendingar á skránni, sum viðgjørdu heimastýrislógina.

Í einari av sendingunum kundu lurtarar ringja inn við spurningum ella viðmerkingum til politikarar. Ein av teimum, sum ringdu inn, var fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaðurin Ivan Johannesen. Hann vísti á, at tá hann var landsstýrismaður í fíggjarmálum, í ringastu krepputíð, var hann noyddur at taka lán uttanlands, fyri at fáa goldið tað, sum landskassin hevði skyldu at gjalda. Ivan segði, at høvdu Føroyar ikki verið í ríkisfelagsskapi tá, so høvdu vit ikki fingið nakað lán.

*Høgni Hoydal svaraði Ivani soleiðis aftur: "...og viðvíkjandi lánunum, sum tú sigur, tú hevur fingið til serliga góðar treytir, so veitst tú eisini væl Ivan, - og hetta havi eg kannað væl og gjølla, og hetta er dokumenterað í stórum frágreiðingum. – Tey lánini, vit tóku, eisini eftir kreppuna... Vit fingu ikki nakra hjálp úr Danmark, tá kreppan kom. Vit fingu ikki nakrar eyka pengar til Føroyar. Vit tóku nøkur lán, og øll tey lánini rindaðu vit aftur við rentis rentu og eisini til eina rentu, sum var langt omanfyri marknaðarrentuna. Tað vil siga at vit fingu ikki nakran serligan fyrimun í teimum lánunum vit tóku. Tað veitst tú eisini tá tú tók lánið har, at tann rentan, sum tú mátti gjalda, hon var væl omanfyri tað sum Danmark rindar til dømis. So eg skilji ikki at tit kunnu blíva við at siga, at tað var ein fyrimunur..."*

**Endurtøka av ósannindum**

Hetta sum Høgni svaraði Ivani, er als ikki í trá við veruleikan. Tað skal eg venda aftur til. Men lat okkum fyrst hyggja eftir, hvat hendi í løgtinginum fyri góðum 6 árum síðani.

Tá løgtingið í oktober 2001 viðgjørdi fíggjarlógaruppskotið fyri 2002, segði Høgni Hoydal, at danir kravdu "okursrentu" frá føroyingum og Karsten Hansen segði, at áðrenn danir umfíggjaðu føroysku skuldina, høvdu teir sjálvir lánt peningin aðrastaðir frá fyri eina rentu, sum lá ímillum 5 og 5,5 prosent, men *"teir vóru so beinasamir, at teir lántu tað víðari til tað niðurpínda føroyska samfelagið fyri 7 prosent..."*

Hetta fekk Lisbeth L. Petersen at seta ríkisumboðsmanninum ein skrivligan fyrispurning um hesi viðurskifti.

Svarið frá ríkisumboðsmanninum vísti, at tað sum landsstýrismenninir hjá Tjóðveldisflokkinum høvdu sagt, var als ikki í trá við veruleikan. Lánini vóru fíggjað fyri marknaðarrentu, og harumframt vóru 900 mió. krónur av skuldini strikaðar í avtaluni, sum landsstýrið og stjórnin høvdu gjørt tann 10. juni 1998, umframt at aðrar 500 mió. krónur bara skulu rindast aftur, um olja verður funnin við Føroyar.

**Vit søgdu ikki tað, sum vit søgdu**

Svarið frá ríkisumboðsmanninum mundi koma illa við hjá Høgna og Karsten, tí beinan vegin sendu teir eitt tíðindaskriv út, har teir søgdu, at teir vildu ikki hava skuldsetingarnar sitandi á sær, um at teir høvdu sagt ósatt á tingsins røðarapalli. Orðini um at danski staturin skuldi hava vunnið sær eyka rentu av lánunum til Føroya undir kreppuni, søgdu teir vera orð hjá Lisbeth L. Petersen sjálvari, og ikki hjá teimum. Teir kallaðu hetta fyri grovt persónsálop og manupolatión við sannleikanum, og eisini søgdu teir seg undrast yvir, at slíkar skuldsetingar ikki fingu avleiðingar. Og so skuldu teir sjálvandi eisini melda seg sjálvar til landsstýrismálanevndina, fyri at fáa allan sannleikan fram o.s.fr.

Men hetta orðaspælið frá 2001 man Høgni langt síðani hava gloymt, tí nú endurtekur hann tað, sum hann í 2001 pástóð var manupolatión hjá Lisbeth L. Petersen.

- og tað er líka lítið sannheit nú, sum tað var í 2001.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við